## Irak vil ikki hava irakar

Í Svøríki hava myndugleikarnir gjørt av at vísa nøkrum irakum aftur til Irak, tí teir lúka ikki treytirnar fyri at fáa uppihaldsloyvi í Svøríki. Men nú hava sviar fingið ein trupulleika, tí stjórnin í Bagdad vil ikkii taka ímóti teimum útvístu landsmonnunum. Irakski ráðharrin í innflytaramálum, Abdul Samad Rehman Sultan, sigur við svenskar fjølmiðlar, at irakska stjórnin er ímóti at tvingsilsflyta fólk, tí tað er í stríð við mannarættindini. Svenski ráðharrin í innflytaramálum, Tobias Billström, sigur, at Svøríki hevur rætt til at senda irakararnar heimaftur.



## Eiga at avtofta bygdir

Sambært danska granskaranum Jørgen Møller eru húsini í nógvum donskum bygdum í so vánaligum standi, at myndugleikarnir áttu at avtofta bygdirnar. Sjálvur heldur hann, at umleið 500 bygdir áttu at fingið ta lagnuna, og felagið hjá donskum bygdum tekur lutvíst undir við hugskotinum, sigur DR. Tað hevur víst seg, at nógvar av bygdunum enda sum tilhaldsstað hjá rúsevnamisnýtarum, og at tað hevur ymiskt lógloysi við sær. Á donsku hagstovuni vísa framrokningar, at nógvar bygdir har vesturi og har suðuri í Jyllandi fara at minka burtur í einki tey næstu árini.



*Tær gleða seg nógv til longu ferðina, ið byrjar mánadagin. Her eru fimm teirra, sum fara við. Frá vinstru: Maritt, Anna Sofía, Berghild, Súsanna og Sóley*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Út at ferðast við høvdingadóttrini

**15 starvsfelagar hjá Catherine Jacobsen á Tjarnargarði fara mánadagin saman við henni at ferðast. Leiðin gongur til heimland hennara, Fílabeinsstrondina**

FORKUNNUG FERÐ

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Í 12 ár hevur Catherine Jacobsen, millum vinir nevnd Katrin, búð í Føroyum, og tvey einastu árini hevur hon arbeitt á Tjarnargarði í Havn.

Starvsfelag hennara vistu, at Katrin seinasta ár var saman við bindiklubbanum og feraðist á Fílabeinsstrondini, haðani Katrin er ættað.

Ein dag seinasta vetur segði ein av tarvsfeløgum hennara á Tjarnargarði, at tað hevði verið stuttligt, um fleiri teirra fóru ein túr niður til Fílabeinsstrondina.

Katrin tók tær upp á orðið og hongdi ein seðil upp, har tær kundu teknað seg.

Tá av tornaði vóru 15 nøvn komin á listan , og tær fara nú allar við Katrini avstað.

Tær hava gingið og tosað um ferðina hetta seinasta hálva árið, hava roynt at fyrireika seg, men tað var ikki sum at siga tað, tí á netinum var lítið at finna. Tað, sum var at finna, var at kalla alt á fronskum.

### Sjáldsamur møguleiki

- Vit líta fult og heilt á tað, sum Katrin og skyldfólk hennara hava fyriskipað, siga Poula Debes og Súsanna í Soylu, sum fara við á hesa sjáldsomu uttanlandsferð. Ein ferðamøguleiki, sum tær neyvan fáa aftur í lívinum.

Nakrar fyrireikingar hava tær tó verið noyddar sjálvar at gjørt, og tað var at koppseta seg. Tær hava vaksinerað seg móti gulum fepri, hepatitis A og B og difteritis, og tær taka esini tablettir móti malaria.

Mánadagin fara tær ur Føroyum og koma aftur 17. september.

Katrin hevur fingið mostur sína og mann hennara at leggja ferðina til rættis, og tað hava tey gjørt út í æsir.

### Væl fyri

Tey eru múgvandi fólk og hava givið teimum innivist í summarhúsi sínum. Summarhúsið er ikki nøkur kroysa, tí har eru tíggju kømur, og líka nógv vesi, køkur og stova.

Tær sleppa tó frá at hugsa um matgerð, tí tær fáa sína egnu kokkakonu, og konur koma eisini at vaska klæðir teirra.

Bussur við førara er bílagdur til teirra at ferðast við allar dagarnar.

Fílabeinsstrondin er eitt fátækt land, og ikki vandaleyst hjá fremmandafólki at ferðast í. Tí hava skyldfólkini hjá Katrini skaffað teimum fýra lívverjar, sum skulu ansa eftir teimum allar dagarnar.

Ætlanin er eisini at fara at vitja í landinum Gana.

Skrá er gjørd fyri allar dagarnar, og tær skulu m.a. vitja tveir ráðharrar.

Mamma Katrin er ættað av Fílabeinsstrondini, og pápin úr Gana.

Pápin er sonur ein høvdinga, hava tær skilt á lagnum.

Familjan hjá Katrin er øll væl fyri, og maður mostrini eigur hotell í Gana.

### Ikki so dýrt

Ferðin kostar 20.000 krónur fyri hvørja, og tað halda tær ikki vera so galið, tí alt er íroknað.

Hesa ársins tíð liggur hitin millum 25 og 30 stig á Fílabeinsstrondini, nú regntíðin er av. Luftin er slavin, og tað er skýggjað, so tær kunnu ikki vænta at koma sólbrendar heim aftur.

- Vit hava fingið boð um at hava tveir fínar kjólar og fínar skógvar við okkum, siga Poula Debes og Súsanna í Soylu.

Nú nærkast fráferðin, og tær gleða seg ikki bara til at fara til Fílabeinsstrondina, men tað verður eisini deiligt at vera burturi í nógvar dagar saman við góðum starvsfeløgum.

## Børn og ung undir Nærverkið

**Øll stovns- og stuðulstilboð til børn, ung og vaksin verður nú savnað undir sama stovni**

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Frá 1. september, týsdagin, verður málsøkið Børn og ung ein partur av Nærverkinum.

Tað er ein politisk avgerð at flyta málsøkið Børn og Ung frá Almannastovuni til Nærverkið, fyri at øll stovns- og stuðulstilboð til børn, ung og vaksin skulu vera undir sama stovni. Í sama viðfangi eru Trivnaðartænastan og Stuðulstænastan undir Nærverkinum lagdar saman undir eina leiðslu.

Endamálið við at flyta málsøkið er at fáa ein skynsamari rakstur bæði á Almannastovuni og Nærverkkinum, tað vil siga at spara.

Yvirskipaða málið er at savna stuðulskipanir og stovnar landsins undir Nærverkinum og almannaveitingar undir Almannastovuni.